## Katrin í World Cup

Katrin Olsen er í hesum døgum við í World Cup kapping í Luzern. Kappingin byrjar í morgin og heldur fram til sunnudagin. Katrin er við í dupultfýrara í lættvekt. Hon rør saman við trimum øðrum donskum kvinnum, og tær sleppa veruliga at royna seg í kappingini. Í seinastu World Cup kappingini endau donsku kvinnurnar nummar 4, og tað verður sagt, at tær veruliga skulu rógva væl, um teir skulu vinna heiðursmerki í Luzern.

## Cannavaro fær rós

Italski landsliðsvenjarin Marcello Lippi er ikki kendur fyri at rósa ávísum spælarum hjá sær alment, men nú hevur hann gjørt eitt undantak við verjuspælaranum Fabio Cannavaro.

- Cannavaro hevur verið ótrúligur undir HM. Tað kann eingin ivi verða um, at hann er besti verjuspælarin í heiminum, sigur Lippi.

Hann segði eisini, at hansara álit á verjuna og málmannin er so stórt, at hann saktans kann spæla við fýra álopsspælarum í HM-finaluni sunnudagin.

- Verjan hjá okkum er rættiliga góð, og eingin ger nakað við málmannin hjá okkum, segði Lippi.



# Settu føroysk met í NM

**Fýra ungir bogaskjúttar vóru herfyri við í NM fyri juniorar, og hóast eingi heiðursmerki komu við heimaftur, stóðu skjúttarnir seg væl, og teir settu fleiri føroysk met**

BOGASKJÓTING
*Tíðindaskriv*

Teir fýra skjúttarnir, ið vóru við til kappingina, vóru Sjúrður Rein, Tambar, sum skeyt í bólkinum kadet recurve dreingir, og Magnus Andreassen, Kristoffer Andreasen og Kaj Johannesen, allir úr Ørvi, sum skutu í bólkinum kadet compound dreingir.

Í bólkinum hjá Sjúrða vóru 58 luttakarar, og hjá hinum trimum vóru 48 luttakarar. Hetta var størsta luttakaratal nakrantíð til eitt Junior NM.

### Sjúrður stóð seg væl

Leygardagin skutu øll innleiðandi umfør, og føroysku skjúttarnir skutu tvey umfør á 36 pílar. Hetta úrslit bleiv so brúkt til raðfesting í finaluskjóting seinna dagin.

Sjúrður Rein skeyt í fyrsta umfari 321 stig og setti nýtt føroyskt met, í seinna umfari skeyt hann 316 stig, og fekk íalt 637 stig, sum eisini er nýtt føroyskt met.

Allir skuldu víðari til 1/32 útilokingina. Her kom Sjúrður í dyst ímóti einum svia og vann Sjúrður dystin 109-104. Í 1/16 dystinum vann Sjúrður ein spennandi og javnan dyst móti enn einum svia við 110-108. Í 1/8 dystinum bleiv mótstøðan nakað hørð og tapti hann ímóti einum norðmanni 109-113. Hesin norski skjúttin bleiv nr. 4 íkappingini. Men góða skjótingin hjá Sjúrða gjørdi, at hann rykti so mikið langt upp á listan, at hann bleiv nr. 10 saman við einum svia.

### Hørð kapping

Í bólkinum kadet compound skutu teir bestu heilt ótrúliga væl, men Kristoffer Andreasen skeyt eisini sera væl, og hann setti í fyrsta umfari nýtt føroyskt met við 350 stigum av 360 møguligum. Hóast hetta náddi hann bert einum 5 plássi. Seinna umfar var heldur lakari og skeyt hann tá 335 stig, íalt 685 stig, sum eisini er nýtt føroyskt met. Samanlagt bleiv hann nr. 9 og skuldi sostatt sita yvir í 1/32 útilokingini. Í 1/16 dystinum vann Kristoffer trygt á einum norðmanni 115-107, men í 1/8 dystinum gekk ikki eftir vild, her møtti hann einum dana og tapti 113-117. Hesin sami danin bleiv nr. 4 í kapingini.



*Hesir fýra bogaskjúttarnir vóru nú um dagarnar við í NM-kapping fyri juniorar, og teir stóðu seg væl*

### Magnus í spennandi umskjóting

Magnus Andreasen skeyt miðal 662 stig og bleiv innleiðandi nr. 21. Í 1/32 dystinum vann Magnus á einum norðmanni 113-99. 1/16 dysturin haraftur ímóti bleiv ein sera sera spennandi dystur ímóti stóru vónini hjá norðmonnum. Fyrstu tríggjar pílarnar kom Magnus tvey stig afturum. Næstu tríggjar pílarnar vann Magnus eitt stig inn aftur. Triðju ferð vann Magnus tvey stig og fór framum. Við teimum seinastu trimum pílunum javnaði norðmaðurin og dysturin endaði 113-113.

Síðan skuldi umskjóting til, og hon gjørdist sera spennandi, tí báðir skjúttarnir skutu væl. Tað var tó Magnus, sum at enda hevði munin og fór víðari í kappingini.

Í 1/8 dystinum bleiv mótstøðan ov stór, og tá møtti Magnus einum svia, dysturin endaði 113-118. Hesin sami sviin bleiv nr. 3 í kappingini.

Kaj bleiv innleiðandi nr. 22 við 659 stigum og persónligum meti. Í 1/32 vann Kaj 112-97 á einum svia. Men síðan mátti hann lúta fyri einum svia í 1/16 dystinum 112-116.

### Sunnudagin

Eisini var liðskjóting á skránni. Sjúrður var einsamallur og bleiv hann tí settur á eitt blandað norðurlendskt lið saman við einum svenskum dreingi og einari svenskari gentu, sum ikki høvdu skotið serliga væl innleiðandi. Tískil komu tey at møta einum sterkum liði beinanvegin og blivu sligin út úr kappingini við størri tapi.

Harafturímóti høvdu Magnus, Kristoffer og Kaj so mikið fræg úrslit innleiðandi, at teirra lið bleiv nr. 6 av 16 liðum við sama stigatali sum eitt svenskt lið.

Fyrsti dystur í 1/8 útilokingini var ímóti einum liði úr Randers, Danmark. Hendan dystin vunnu teir 222-196 og settu nýtt føroyskt met. Í ¼ finaluni skutu teir ímóti einum svenskum liði. Dysturin var skiftandi og spennandi, men taptu teir 222-229. Hetta úrslit gav føroyska liðnum eitt pláss sum nr. 5 í kappingini.

Samanumtikið kann sigast, at tá mann kemur heim aftur við fleiri føroyskum metum, so hava føroysku dreingirnir skotið væl.

Ferðalagið kom aftur til Føroya seint mánakvøldið, nakað darvað av støðuni í Keypmannahavn. Hetta førdi eisini við sær, at helvtin av viðførinum lá eftir í Keypmannahavn.

Bogaskjótideildin takkar øllum fyri hjálp og stuðul, tí uttan stuðlar eru slík tiltøk ikki møgulig.

## Róaldur stakk avstað

**Róaldur Jacobsen hevur lagt seg trygt á odda í HM-tippingini hjá Sosialinum. Bara tveir dystir eru nú eftir, áðrenn vinnarin av kappingini kann fara eftir stóra vinninginum**

TIPPING
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Sunnukvøldið komandi er HM-kappingin av, og tá fæst so eisini at vita, hvør verður vinnari í HM-tippinginini, sum Sosialurin og Formula.fo hava skipað fyri.

Her hevur Róaldur Jacobsen lagt seg hampuliga trygt á odda undan seinasta umfarinum. Í hálvfinalunum vann Róaldur sær 10 av 12 møguligum stigum, og á tann hátt skapti hann sær veruliga eitt hol niður til næstu kappingarneytarnar. Støðan undan finaluni og bronsudystinum í HM-tippingini er nú hendan:

| Nr | Navn | Stig |
|---|---|---|
| 1 | Róaldur Jacobsen | 48 |
| 2 | Regin Sivertsen | 44 |
| 3 | Magnus Simonsen | 42 |
| 3 | Áki Andreasen | 42 |
| 5 | Ragnar Háskor | 41 |
| 6 | Rúni Mortensen | 40 |
| 6 | John Michal Petersen | 40 |
| 6 | Jákup Ósá | 40 |
| 9 | Rógvi Højgaard | 38 |
| 10 | Debes Danielsen | 37 |
| 10 | Áki Johansen | 37 |

## Marathon í Havn nærkast

**Bragdið bjóðar nú rennarum úr Føroyum og útlondum til Tórshavn Marathon, sum verður hildið um 10 dagar**

MARATHON
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Sunnudagin 16. juli verður Atlantic Airways Tórshavn Marathon hildið. Hetta er blivið ein árlig rennikapping, har bæði føroyskir og útlendskir rennarar eru við.

Runnið verður á ymsum teinum. Høvuðskappingin er sjálvandi marathon-renningin, men tað ber eisini til at renna hálvt marathon og ymsar styttri teinar. Stuttleikarenningarnar verða tvær, ávikavist 5,8 km og 3 km.

Marathon-renningin er samstundis kapping um FM heitið, og teir rennarar, sum kappast um hetta heiti, skulu verða limir í einum av feløgunum fyri frælsan ítrótt í Føroyum.

Runnið úr miðbýnum í Havn. Runnið verður fyrst 5,8 km runt í Havnini. Síðan verður runnið móti Kaldbak og aftur til Havnar, fram við Strond. ½ marathonrennarar venda áðrenn Sundsverkið. Marathonrennarar venda í Kaldbak.

Renningin byrjar og endar á sama staði í miðbýnum í Havn.

Fyri at renna marathon skal ein hava fylt ella fylla 18 ár í ár, og fyri hálvmarathon er markið 16 ár. Samstundis er miðvís marathonvenjing sjálvandi eisini ein fortreyt. Stuttleikarenningin er fyri øll og er býtt sundur í tveir bólkar. Upp til 12 ár renna 3 km, 13 ár og eldri renna 5,8 km.

Tað ber til at lesa meira um kappingina á torshavnmarathon.com, og har ber eisini til at tekna seg til kappingina.